**Tíðindaskriv:**
**Landsstýriskvinnan valt umboð í Yrkisútbúgvingarráðið**

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø hevur valt fýra umboð í Yrkisútbúgvingarráðið eftir tilmæli frá avvarðandi yrkisfeløgum.

Uppgáva ráðsins er at viðgera mál viðvíkjandi arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingum og at geva landsstýriskvinnuni tilmæli hesum viðvíkjandi.

Formaðurin er tilnevndur av landsstýriskvinnuni, sum eisini hevur valt 4 limir eftir tilmæli frá arbeiðsgevarafeløgunum, og 4 limir eftir tilmæli frá løntakarafeløgunum.

Ráðslimirnir eru valdir fyri eitt 4 ára skeið.

Tey nýggju umboðini eru:

- Emy S. Niclasen fyri S&K felagið, hon er afturvald
- Elin Sørensen fyri Føroya Arbeiðarafelag, hon er nývald
- Eyðvør Berg fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag, hon er nývald
- Esther Dahl fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag, hon er afturvald

Hini umboðini í Yrkisútbúgvingarráðnum eru:

- Alfred Petersen, formaður valdur av landsstýriskvinnuni.
- Durita Tausen, fyri Mentamálaráðið
- Magnus Magnussen fyri Føroya Handverksmeistarafelag
- Anna Johannesen fyri Starvsmannafelagið
- Suni Simonsen fyri Føroya Handverkarafelag, hann hevur júst tikið sæti í ráðnum sum varalimur fyri Harald Østerø, sum hevur valt at taka seg úr ráðnum.

Hesi umboð standa fyri vali um tvey ár

Yrkisdepilin er fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum.